# HEILSANIR



**Góða Kára**
Hjartaliga tillukku við 11 ára degnum 19. okt. Vit elska teg.
**Ynskja mamma, Eljón, Sigmundur og Leon**



**Góði fitti Helgi**
Hjartaliga tillukku við 4 ára føðingardegnum tann 18. okt. Eg elski teg.
**Heilsan fastur**



**Elskaði beiggi**
Hjartalia tillukku við degnum. Takk fyri at tú ert so góður við meg. Elski teg.
**Ynskir Thala Ann**






**Góði elskaði Hans Jákup**
Nú ert tú eitt ár størri enn tú var. Hjartaliga tillukku við 6 ára degnum. Vit elska teg.
**Bestu ynskir mamma og babba**



**Góða elskaða Annika**
Hjartaliga tillukku við 1 ára degnum. Eisini ein heilsan til Bárður og didduna.
**Ynskja omma og abbi í Havn**

Tíðindaskriv í sambandi við ársfrágreiðing Landssjúkrahúsins fyri árið 2005:

# Færri innleggingar, men fleiri viðgerðir á Landssjúkrahúsinum

**Landssjúkrahúsið hevur givið út ársfrágreiðing fyri árið í fjør. Í frágreiðingini sæst millum annað, hvussu miðvísar umleggingar frá innleggingum til ambulantar viðgerðir og kanningar hava økt um virksemið**



**TÓRSHAVN, 18. oktober 2006:** – Landssjúkrahúsið er størsta almenna arbeiðsplássið í Føroyum og hevur eina rakstrarjáttan, sum telur umleið 8% av løgtingsfíggjarlógini. Í ársfrágreiðingini fyri 2005, sum júst er útkomin, sæst, at úrslitið av rakstrinum í fjør vísti eitt lítið hall uppá 1,3 mió. kr., svarandi til 0,4% av samlaðu játtanini.

Hesi seinastu árini hevur tað verið torført hjá sjúkrahúsinum at fáa javnvág í fíggjarliga raksturin, og í ársfrágreiðingini hómast nakrar av orsøkunum til hetta. Millum annað sæst, at játtanin til annan rakstur enn lønir hevur staðið í stað hesi seinastu fimm árini, samstundis sum nakrar av tungu rakstrarútreiðslunum, eitt nú orka og heilivágur, eru nærum tvífaldaðar í sama tíðarskeiði. Hetta eru útreiðslur, sum ikki kunnu sparast burtur. Samanumtikið verður rakstrarúrslitið fyri í fjør tí mett at vera nøktandi.

## Fleiri skurðviðgerðir

Samanlagt vóru 10.596 innleggingar á Landssjúkrahúsinum í fjør. Hetta er ein minking svarandi til 8 prosent í mun til árið fyri. At innleggingarnar fækka kemst av miðvísum umleggingum av virkseminum á sjúkrahúsinum fram ímóti alt fleiri ambulantum kanningum og viðgerðum. Talið á ambulantum vitjanum á sjúkrahúsinum hækkaði soleiðis við heili 34 prosentum í mun til árið fyri. Samanlagt taldu ambulantu vitjanirnar í fjør 30.644.

At alt fleiri viðgerðir og kanningar verða gjørdar ambulant hevur millum annað tann fyrimun, at sjúklingarnir uppliva eina smidligari viðgerðargongd, alt meðan sjúkrahúsið fær viðgjørt sjúklingar skjótari og harvið minkað um bíðitíðina. Hesar umleggingar eru ein av høvuðsorsøkunum til at skurðviðgerðirnar á Landssjúkrahúsinum í fjør vóru 10 prosent fleiri enn árið fyri. 4.174 sjúklingar vóru skurðviðgjørdir í 2005.

Hóast stór framstig eru hend eru framvegis ov long bíðitíð til summar viðgerðir og kanningar, men hesum verður støðugt arbeitt við.

## Talgild heilsuskipan og aðrar verkætlanir

Umframt at greiða frá virkseminum og gongdini í fjør í tølum rúmar ársfrágreiðing Landssjúkrahúsins eisini fleiri longri frásagnir um m.a. arbeiðið við talgildu heilsuskipanini, komandi umbyggingar og eina nýskapandi verkætlan, ið miðar ímóti at geva fyrrverandi og núverandi sálarsjúkum møguleika at arbeiða innan tað psykiatriska økið.

Frágreiðingin er tøk á heimasíðu sjúkrahúsins, www.lsh.fo, og prentað eintøk av frágreiðingini kunnu fáast við at venda sær til Landssjúkrahúsið.